Kristina Háfoss
Sirið Stenberg
Høgni Hoydal
Beinta Løwe Jacobsen
Hervør Pálsdóttir
vegna Tjóðveldi

Løgtingið

Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Húsalánsgrunn (Bústaðir byggja 400 leigu-, luta-, lestrar- og vardar íbúðir kring alt landið)

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Húsalánsgrunn
(Bústaðir byggja 400 leigu-, luta-, lestrar- og vardar íbúðir kring alt landið)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 62 frá 31. mai 2010 um Húsalánsgrunn, sum broytt við løgtingslóg nr. 140 frá 6. oktober 2011, løgtingslóg nr. 125 frá 7. desember 2012 og løgtingslóg nr. 81 frá 29. mai 2017, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 5 a, stk. 1 verður "lutafeløg" broytt til: "lutaíbúðafeløg".

2. Í § 5 a, stk. 1 verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett:
"Húsalánsgrunnurin kann eisini útvega lutaíbúðir til lutaíbúðafeløg."

3. Í § 8 b verður aftan á stk. 1 sum nýtt stk. sett:
"*Stk. 2.* Húsalánsgrunnurin kann hartil fíggja bygging av bústøðum upp til 500 mió kr. við at skriva út lánsbrøv til íleggjarar í Føroyum."
Stk. 2-5 verða eftir hetta stk. 3-6.

4. Í § 8 b, stk. 2 (sum verður stk. 3) verður "sbrt. stk. 1" broytt til: "sbrt. stk. 1 og 2".

5. Í § 8 b, stk. 3 (sum verður stk. 4) verður "sbrt. stk. 1" broytt til: "sbrt. stk. 1 og 2".

6. Í § 8 b, stk. 4 (sum verður stk. 5) verður "sbrt. stk. 1" broytt til: "sbrt. stk. 1 og 2".

7. Í § 8 b, stk. 5 (sum verður stk. 6) verður "sum ásett í stk. 2" broytt til: "sum ásett í stk. 3".

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Øll hava rætt til góðan bústað. Í løtuni er bústaðartrotið stórt, og hetta ger tað trupult hjá nógvum at fáa til vegar hóskandi bústað. Tí hava øll ikki ein nøktandi bústað í dag.

Samstundis leggur bústaðartrotið trýst á prísirnar á bústaði, og er føroyski bústaðarmarknaðurin alt ov einstáttaður.

Skulu vit tryggja trivnað og framgongd í samfelagnum, er neyðugt at loysa bústaðaravbjóðingina.

Tað eigur at bera til at fáa til vegar ein bústað, sum hóskar til, har tú ert í lívinum. T.d. sum ung/ur, lesandi, barnafamilja ella eldri, og eisini uttan mun til, um tú ynskir at búseta teg á bygd ella í bý. Eisini skal bera til at fáa hjálp, um tú brádliga stendur uttan bústað.

Hetta ynskja vit í Tjóðveldi, og er hetta lógaruppskotið ein liður í at loysa bústaðaravbjóðingina.

Uppskotið gevur Bústøðum heimild til at útskriva lánsbrøv á virði upp til 500 mió. kr. við trygd í føstu ognini. Hetta ger, at byggjast kunnu um 400 fleiri bústaðir kring alt landið. Hetta fer at geva fleiri leigubústaðir, vardar bústaðir, lutabústaðir, lestrarbústaðir og fleiri tøkar bústaðir til bráðtørvslistan, ið er til at hjálpa teimum, ið brádliga standa uttan bústað.

Uppskotið gevur Bústøðum heimild til, at fleiri av bústøðunum hjá Bústøðum gerast lutabústaðir. Heimildin ger, at Bústaðir kunnu selja burtur av bygdu leigubústøðunum, soleiðis at hesir gerast lutabústaðir. Hetta ger, at vit fáa eitt meira fjøltáttað útboð av bústøðum í Føroyum. Hetta ger eisini, at Bústaðir fáa inntøkur frá seldu bústaðarlutunum, ið aftur kunnu nýtast at byggja fleiri bústaðir fyri.

Undanfarna valskeið vórðu nógv átøk framd fyri at betra um umstøðurnar á føroyska bústaðarmarkanaðinum, men tørvur er á enn fleiri átøkum.

Í undanfarna valskeiði vórðu m.a. fylgjandi bústaðarpolitisk lógaruppskot framd:

- Bústaðir fingu heimild til at byggja fyri 250 mió. kr. Hetta svarar til minst 200 bústaðir afturat.
- Skattligi botnfrádrátturin fyri leiguinntøkur varð í tíðaravmarkað tíðarskeið hækkaður upp í 100 tús. kr. árliga fyri at eggja fleiri til at leiga út til langtíðarleigu, heldur enn til stutttíðarleigur og/ella ikki útleiga.
- Leigunevndin fekk heimild at forða fyri órímiligum hækkingum av leigukostnaði.
- Bráðtørvslisti, við tilhoyrandi íbúðum, varð stovnaður. Bráðtørvslistin er ætlaður teimum, ið hava ein bráðfeingis bústaðartørv.
- Almannaverkið fekk heimild at gera avtalur við privat um ávísingarrætt til leigubústaðir.
- 200 mió. kr. vórðu settar av til at byggja nýggjar bústovnar.
- Familjuískoytið varð sett í verk, sum m.a. kann nýtast sum bústaðarískoyti hjá barnafamiljum í trongum fíggjarligum korum.

Neyðugt er tó at fremja meira, og hetta uppskotið er ein roynd at fáa fleiri bústaðir kring landið og harvið bøta um bústaðatrotið, sum seinastu árini er vorðið alsamt størri.

Um lógaruppskotið

Í ársfrásøgnini hjá Bústøðum fyri 2019 sæst, at Bústaðir hava á leið 500 bústaðir. Harav eru 333 leigubústaðir í rakstri kring landið og umleið 165 íbúðir verða bygdar í løtuni.

Hetta lógaruppskotið fer at gera tað møguligt hjá Bústøðum at fara undir eina ætlan at byggja um 400 íbúðareindir kring landið árini 2021 til uml. 2023. Sostatt kunnu Bústaðir hava um 900 íbúðareindir í rakstri um nøkur fá ár. Hetta fer at bøta munandi um støðuna á føroyska bústaðamarknaðinum.

Lógaruppskotið ger eisini greitt, at Húsalánsgrunnurin/Bústaðir kunnu útvega lutaíbúðir til lutaíbúðafeløg. Í galdandi lóg um Húsalánsgrunn er ikki greitt, at Húsalánsgrunnurin/Bústaðir kunnu byggja og útvega lutaíbúðir til lutaíbúðafeløg.

Lutaíbúðir og lutaíbúðafeløg eru nýggj fyribrigdi í Føroyum. Bústaðir hava ætlanir um at útvega og selja lutaíbúðir til lutaíbúðafeløg næstu árini. Hetta er liður í at tryggja fjølbroytni á bústaðamarknaðinum, sum er eitt av endamálunum hjá Húsalánsgrunninum/Bústøðum sambært endamálsorðingini í løgtingslógini um Húsalánsgrunn og samsvarar hetta eisini við bústaðapolitikk landsins frá 2012.

Eisini stuðlar lógarbroytingin undir at fáa fleiri føroysk lánsbrøv. Harvið er lógaruppskotið ikki bara við til at skapa eitt bústaðaundirstøðukervi, men eisini eitt fíggjarligt undirstøðukervi.

Yvirskipað um Bústaðir og støðuna á bústaðamarknaðinum

Húsalánsgrunnurin varð í 2011 umskipaður til eitt alment bústaðafelag – Bústaðir. Endamálið við umskipanini var, at Bústaðir frameftir skuldi hava ein meira virknan leiklut á bústaðaøkinum við tað, at felagið nú sjálvt skuldi fara undir at útvega og umsita leigubústaðir.

Ætlanin var eisini, at Bústaðir skuldi virka sum eitt bústaðapolitiskt amboð, ið kundi veita ráðgeving, og sum kundi arbeiða fyri meira skipaðum viðurskiftum á leigu- og lutaíbúðamarknaðinum.

Síðani 2012 hava Bústaðir útvegað meira enn 300 leigubústaðir, og gongd er í nógvum byggiverkætlanum. Almenna bústaðafelagið hevur sostatt upp á fá ár megnað at slóða fyri einum væl meira útbygdum føroyskum leigumarknaði.

Hóast hetta hevur føroyski bústaðamarknaðurin kanska ongantíð verið undir størri trýsti, enn hann í løtuni er. Høvuðsorsøkin er søguligi fólkavøksturin í mong ár, men eisini eru onnur viðurskifti, ið gera seg galdandi: Húsarhaldsstøddin er minkað úr 3,5 til 2,5 persónar í miðal, eldri borgarar ynskja sær smærri bústaðir; størri trýst á miðstaðarøkini og búskaparvøksturin hava við sær høgar byggikostnaðir og harav avleiddar prísir og leigur.

Síðstu nógvu árini eru harafturat bygdir ov fáir nýggir bústaðir, sammett við fólkavøksturin.

Fólkatalið er til dømis hækkað um 4.000 fólk síðstu fimm árini. Við húsarhaldsstødd á 2,5 fólk í miðal krevur hetta um 1.600 nýggjar bústaðir. Hóast hetta eru bara bygdir um 150-200 bústaðir um árið í miðal síðstu fimm árini. Hetta gevur eitt undirskot av nýggjum bústøðum á um 600 bústaðir síðstu fimm árini. Mett varð í fjør, at um 1.000 nýggir bústaðir eru ávegis í privatum ætlanum og í ætlanum hjá Bústøðum, men óvist er, nær hesir bústaðirnir eru liðugt bygdir.

Nógv bendir tó á, at samlaði tørvurin á leigu- og eigaraíbúðum er munandi størri enn teir um 600 bústaðirnir, sum eru nevndir omanfyri.

Fleiri bygnaðarligir skeivleikar eru á føroyska bústaðamarknaðinum, sum hava stórar avbjóðingar við sær. Avbjóðingarnar verða sjálvandi serliga sjónligar, tá ið fólkavøkstur er.

Bústaðaútboðið í Føroyum er sera einstáttað og siðbundið. Nógv og stór sethús eru, men bara fáar smærri og ódýrar leiguíbúðir eru. Nógv av sethúsunum hóska seg ikki til eldri fólk ella rørslutarnað, eins og staðsetingin ikki altíð er har, sum fólk ynskja at búgva.

Í flestu av okkara grannalondum hevur í fleiri áratíggju verið ein almennur leigumarknaður undir skipaðum viðurskiftum við smærri og ódýrum leiguíbúðum, meðan hetta bara hevur heilt fá ár á baki í Føroyum. Eisini hetta er ein orsøk til, at undirskot er av smærri og ódýrum leiguíbúðum.

Einstáttaða og siðbundna byggimynstrið í Føroyum hevur eisini gjørt, at ein skipaður, privatur leigumarknaður við smærri og ódýrum leiguíbúðum hevur ikki kunnað tikið seg upp í landinum. Føroyski íbúðarleigumarknaðurin fevnir fyri tað mesta um kjallaraíbúðir í sethúsum, sum fólk leiga út, tí avlopspláss er í húsunum. Vansin við tílíkum leigumálum er, at leigumálini eru ótrygg fyri leigaran og hóska seg í nøkrum førum ikki til langtíðarleigu.

Alt bendir á, at bygnaðarliga undirskotið av íbúðaeindum er somikið stórt og av einum tílíkum slagi, at bæði landið, kommunurnar, byggifeløg, lánveitarar og íleggjarar mugu vísa vilja til at taka felags tøk fyri at loysa avbjóðingina næstu árini. Við hesum lógaruppskotinum verða tikin ítøkilig stig til at víðka fíggjarligu heimildirnar hjá Bústøðum til tess at loysa ein part av avbjóðingini.

Ein atfinning, sum ofta verður nevnd í sambandi við leigubústaðir, er, at "føroyingar ynskja ikki at búgva til leigu, men ynskja at eiga egin hús og at seta føtur undir egið borð". Óivað er rætt, at flestu húski ynskja at eiga egin hús heldur enn at búgva til leigu. Fleiri húski og einstaklingar kunnu kortini koma í eina slíka støðu eitt tíðarskeið í lívinum, at tey ikki hava møguleika ella fíggjarligt rásarúm at fíggja og eiga egin hús. Í eini tílíkari støðu kann vera neyðugt og skilagott at búgva í einum leigubústaði í eitt avmarkað tíðarskeið til ráðini gera tað møguligt at fíggja og eiga egnan bústað.

Talan kann vera um ungar familjur, sum fyri kortum eru byrjaðar á arbeiðsmarknaðinum. Talan kann eisini vera um lesandi ella stakar uppihaldarar. Fyri tílíkar bólkar kann vera bæði neyðugt og skilagott at búgva til leigu eitt tíðarskeið, til fíggjarliga rásarúmið ger tað møguligt at fíggja og eiga egnan bústað.

Fyri eldri borgarar kann eisini vera neyðugt og skilagott at búgva í einum leigubústaði. Sethúsini kunnu til dømis ikki vera egnað til rørslutarnað fólk ella til koyristólar. Tá ið eldri fólk selja hús síni, leysgevur hetta hús á marknaðinum, sum aðrar, yngri familjur kunnu keypa.

Hetta kann eisini vera ein máti hjá eldri fólki at fáa gagnnýtt tað frívirði, sum er í nógvum sethúsum.

1.2. Galdandi lóggáva

Í galdandi lóggávu, løgtingslóg nr. 62 frá 31. mai 2010 um Húsalánsgrunn við seinni broytingum, er heimilað Bústøðum (gamla Húsalánsgrunninum) at læna tilsamans 250 mió. kr. frá føroyskum íleggjarum og stovnsligum føroyskum lánveitarum til at fíggja bústaðabygging.

Bústaðir hava um 500 leigubústaðir tøkar ella í gerð. Hesir nøkta ikki stóra tørvin á leigubústøðum í Føroyum. Hetta lógaruppskotið gevur tí Bústøðum møguleika at fara undir eina ætlan at byggja um 400 íbúðaeindir kring landið árini 2021 til 2023. Sostatt kunnu Bústaðir hava um 900 íbúðaeindir í rakstri um nøkur fá ár, sum væntandi fer at bøta um støðuna á føroyska bústaðamarknaðinum.

Í galdandi lóg um Húsalánsgrunn er ikki nóg greitt ásett, at Húsalánsgrunnurin/Bústaðir kunnu byggja og útvega lutaíbúðir til lutaíbúðafeløg. Hetta lógaruppskotið ger tí eisini greitt, at Húsalánsgrunnurin/Bústaðir kunnu útvega lutaíbúðir til lutaíbúðafeløg. Hetta er liður í at tryggja fjølbroytni á bústaðamarknaðinum, sum er eitt av endamálunum hjá Húsalánsgrunninum/Bústøðum.

1.3 Endamálið við uppskotinum

1. 400 fleiri leigu-, luta-, lestrar og vardar íbúðir

Endamálið við uppskotinum er at byggja 400 leigu-, luta-, lestrar- og vardar bústaðir afturat, við at víðka verandi fíggingarmøguleikar hjá Bústøðum til at útskriva lánsbrøv á upp til 500 mió. kr. við trygd í føstu ognunum hjá Bústøðum. Víðkaðu fíggingarmøguleikarnir fara at gera tað møguligt hjá Bústøðum at fara undir eina ætlan at byggja um 400 íbúðareindir kring landið árini 2021 til um 2023.

2. Byggja íbúðir kring alt landið

Hesar 400 íbúðaeindirnar eiga at verða bygdar kring alt landið og í mun til, hvar eftirspurningur er eftir leigu-, luta-, lestrar- og vardum bústøðum. Sostatt fara lógaruppskotini at bøta um bústaðatrotið kring alt landið.

3. Bústaðir til fólk við bráðtørvi

Bráðtørvslistin varð settur á stovn í undanfarna valskeiði, men tørvur er á, at fáa fleiri tøkar íbúðir á listan, soleiðis at fólk, sum koma í brádliga bústaðarneyð, kunnu fáa atgongd til eina íbúð til møguleiki hevur verið fyri at fóta sær og finna eina meira varandi loysn. Við 400 fleiri leigumálum fara munandi fleiri íbúðir at gerast tøkar á bráðtørvslistanum.

4. Fleiri vardar bústaðir og lestrarbústaðir

Fimta hvør íbúð hjá Bústøðum verða hartil tøkar til fólk við serligum avbjóðingum, og verða tí minst 80 nýggjar vardir bústaðir tøkir. Hartil kunnu lestarbústaðir byggjast sum partur av hesum, og í samstarvi við kommunurnar kring landið.

5. Lutabústaðir fjøltátta bústaðamarknaðin

Bústaðir fáa heimild til eisini at kunna byggja lutabústaðir. Harvið kunnu Bústaðir byggja og selja part av leigubústøðunum til lutabústaðir. Hetta fjøltáttaðar bústaðamarknaðin, og gevur inntøkur, ið Bústaðir aftur kunnu nýta at byggja fleiri bústaðir fyri.

6. Fígging av bústaðabygging uttan fyri størru býirnar

Bústaðir fáa heimild til at veita lán til bústaðabygging við veð í føstu ognini. Henda fíggingarheimild verður tó bert galdandi fyri bústaðabygging uttan fyri størru býirnar. Bústaðir kunnu bjóða eitt lán, ið fevnir um tann partin av bústaðarláninum, ið bankin ikki kann bjóða, tó ongantíð meira enn upp til 100% av metingarvirðinum. Hetta er sjálvandi treytað av, at tey, ið søkja um lán, hava neyðugu inntøkurnar og gjaldevnini til at rinda lánið aftur.

7. Føroysk virðir í føroyska virðisskapan

Lógaruppskotini skapa eisini eitt nýtt fíggjarligt undirstøðukervi. Í dag verður meginparturin av føroysku uppsparingini hjá fólki og fyritøkum – og eisini tær 10 mia. kr. í pensjónsuppsparing – sett í útlendsk lánsbrøv. Heruppií eru donsk realkredittlánsbrøv, ið verða nýtt til at fíggja bústaðabygging í Danmark. Í Føroyum eru sera avmarkaðir møguleikar at seta uppsparing í trygg

virðisbrøv við tryggum avkasti yvir longri áramál. Hesi lógaruppskot lata upp fyri hesum møguleika.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Lógaruppskotið hevur til endamáls at loysa bústaðartrotið við at fáa bygt fleiri leigu-, luta-, lestrar- og vardar bústaðir kring alt landið.

Hækkaða lániheimildin við at skriva út lánsbrøv á 500 mió. kr. afturat við trygd í føstu ognunum gevur Bústøðum møguleika at fara undir eina ætlan at byggja um 400 framskundaðar leiguíbúðir kring landið árini 2021 til um 2023. Sostatt kunnu Bústaðir hava út við 900 leiguíbúðir í rakstri um nøkur fá ár, sum væntandi fara at bøta um støðuna á føroyska bústaðamarknaðinum.

Lógaruppskotið ger eisini greitt, at Húsalánsgrunnurin/Bústaðir kunnu útvega lutaíbúðir til lutaíbúðafeløg. Hetta er liður í at tryggja fjølbroytni á bústaðamarknaðinum, sum er eitt av endamálunum hjá Húsalánsgrunninum/Bústøðum.

1.5. Ummæli

Hetta lógaruppskotið hevur ikki verið til almenna hoyring. Men hevur líknandi lógaruppskot verið til almenna hoyring á vári 2019, og til viðgerð á Løgtingi í undanfarnu tingsetu.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Lógaruppskotið kann fáa jaligar, óbeinleiðis fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur. Fyrst og fremst tí eitt størri útboð av leiguíbúðum kring landið fer at stuðla undir fólkavøksturin, sum er í landinum. Fólkavøksturin fer, sum frálíður, at skapa grundarlag undir størri virksemi, hægri inntøkum og meira varandi búskaparvøkstri. Hetta fer sjálvsagt eisini, sum frálíður, at skapa grundarlag fyri hægri inntøkum til landskassan og kommunukassar. Harafturat kann hugsast, at nakað meira av byggivirksemi verður í landinum, orsakað av uppskotinum. Tí er ikki óhugsandi, at skatta- og avgjaldsinntøkur til land og kommunur fara at hækka nakað av uppskotinum.

Víðkaðu møguleikarnir fyri at seta part av føroysku uppsparingini í føroysk lánsbrøv, heldur enn útlendsk lánsbrøv, fara at gera, at størri partur av virðisskapanini í Føroyum kann koma føroyska samfelagnum til góðar. Hetta fer í hesum føri at skapa grundarlag fyri at fjøltátta føroyska bústaðamarknaðin og harvið styrkja grundarlagið undir framhaldandi fólka- og búskaparvøkstri.

Í Fíggjarmálaráðnum varð í fjør ikki mett, at tað fer at ávirka kredittmetingina (ratingina) av landsstýrinum, at Bústaðir fáa heimild at hækka lántøkuna í fyrra lagi, tí talan er um at útskriva lánsbrøv, ið bara hava trygd í føstu ognunum hjá Bústøðum. Onnur trygd verður ikki latin í sambandi við lántøkuna. Sostatt átekur landskassin og landið sær ikki váða í sambandi við lántøkuna. Í øðrum lagi hava Bústaðir frammanundan lítið av skuld sammett við samlaðu ognirnar. Í triðja lagi varð ikki mett í Fíggjarmálaráðnum, at tað í hesum føri er talan um eina verkætlan við lítlum og avmarkaðum váða fyri Bústaðir. Talan er um at byggja leiguíbúðir kring landið, sum bygnaðarligt og søguligt undirskot er av.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið verður ikki mett at hava stórvegis umsitingarligar avleiðingar fyri land ella kommunur. Tó fer uppskotið at hava nakað av umsitingarligum avleiðingum við sær fyri Bústaðir.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Uppskotið verður samanumtikið mett at hava jaligar fíggjarligar avleiðingar fyri vinnuna. Uppskotið fer at økja um virksemið í byggivinnuni og øðrum avleiddum virksemi av byggivinnuni og hjá undirveitarum til byggivinnuna. Betri møguleikar at búseta seg í landinum fara at gera tað lættari hjá fólki at flyta til Føroya og búseta seg her. Kappingarførið hjá vinnuni og samfelagnum verður betri, tá ið umræður at fáa hendur á neyðugu arbeiðsmegini.

Av tí at lógaruppskotið avmarkar lántøkuna til at fevna um lánsbrævalán frá íleggjarum/lánveitarum í Føroyum, fer uppskotið at hava við sær nakað av umsitingarligum avleiðingum fyri vinnuna og teir íleggjarar/lánveitarar, sum kunnu hugsast at vera partur av fíggingini.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Allar leiguíbúðirnar, sum Bústaðir byggja, nýta grønar hitaskipanir heldur enn oljufýr. Íbúðirnar fara eisini at lúka øll krøv í nýggju bygningskunngerðini um bjálving og líknandi.

Íbúðabyggingin hjá Bústøðum fer tí ikki at hava stórvegis avleiðingar fyri umhvørvið, undantikið tí orku og tilfari, sum verður brúkt undir sjálvari byggingini.

Av tí, at íbúðirnar hjá Bústøðum nýta grønar hitaskipanir og lúka nýggjastu krøv til bjálving og líknandi, kann íbúðabyggingin viðvirka til eina umstilling av orkunýtsluni til upphiting frá oljufýrum til grønar hitaskipanir. Sum frálíður fer uppskotið og bygging av smærri íbúðareindum tí helst at hava jaligar avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Uppskotið fer at hava jaligar avleiðingar fyri tey øki í landinum, har Bústaðir fara at byggja fleiri bústaðir. Uppskotið og byggingin av íbúðum fer at gera tað lættari hjá fólki at verða verandi, virka og búgva í nærøkinum heldur enn at ferðast langa leið til og frá arbeiði. Lættari verður at fáa til vegar arbeiðsmegi í nærøkinum og at fáa arbeiðsmegina at støðast.

Byggingin av íbúðunum verður spjadd um alt landið til tey øki, har trot er á bústøðum – og partur av nýggju íbúðunum eiga eisini at verða bygdar á útoyggjum. Hetta fer tí at skapa menning kring alt landið.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Uppskotið fer at hava jaligar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar, serstakliga teir, sum í dag hava torført við at finna hóskandi leigubústað. Hetta kunnu vera stakir uppihaldarar ella rørslutarnað, sum í dag hava torført við at finna hóskandi leigubústað. Bústaðir hava í dag til dømis gott samstarv við Javna, Sinnisbata, MEGD og Almannaverkið, tá ið tað snýr seg um at útvega hóskandi íbúðir til limir og brúkarar hjá teimum.

Almannaverkið hevur ávísingarrætt til ein part av íbúðunum, sum Bústaðir byggja. Endamálið er, at fólk við serligum avbjóðingum fáa betri møguleikar at fáa hóskandi bústað. Hetta lógaruppskotið fer tí at vera til fyrimuns fyri hendan samfelagsbólkin. Leiguíbúðirnar vera eisini til fyrimuns fyri lesandi, stakar uppihaldarar og eldri borgarar, sum fáa betri møguleikar at fáa ein hóskandi bústað.

Eisini fara fleiri íbúðir at verða tøkar á bráðtørvslistanum, og fer hetta at gera tað møguligt í størri og betri mun at hjálpa fólki, ið brádliga standa uttan bústað.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur við sær avleiðingar, sum eru viðkomandi fyri millumtjóðasáttmálar á økinum, og sum Føroyar hava skyldu at fylgja.

Bindingar eru ikki til millumtjóðasáttmálar, sum gera, at uppskotið fær fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella aðrar avleiðingar fyri landsmyndugleikar, kommunumyndugleikar, ávís øki í landinum, ávísar samfelagbólkar ella vinnuna.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

Lógaruppskotið stuðlar undir og samsvarar við ásetingar í sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek. Sáttmálin áleggur limalondunum at menna og fremja politikk, lógir og fyrisitingarlig mál, ið skulu tryggja rættindi hjá fólki, ið bera brek. Sáttmálin varð settur í gildi fyri Føroyar tann 23. august 2009 við "Bekendtgørelse nr. 35 af 15. september 2006 om rettigheder for personer med handicap".

Lógaruppskotið fer at økja útboðið av leiguíbúðum, sum hóska seg til fólk við serligum avbjóðingum, harundir til fólk, ið bera brek. Tí verður mett, at lógaruppskotið stuðlar undir og samsvarar við ásetingar í sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

Uppskotssetararnir hava tikið tey 17 heimsmálini hjá ST til sín og ynskja at røkka teimum eftir førimuni. Heimsmál nr. 11 snýr seg um at gera býir og búsetingar inkluderandi, trygg, dygg og burðardygg. Undirmál nr. 11.1 snýr seg um, at innan 2030 skal øllum verða tryggjað atgongd til skikkaðar og tryggar bústaðir fyri rímiligan kostnað og grundleggjandi tænastur.

Lógaruppskotið fer tí at stuðla undir at røkka teimum 17 heimsmálunum hjá ST.

Lógaruppskotið hevur ikki á annan hátt við sær avleiðingar í mun til tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

2.9. Markaforðingar

Løgtingslóg nr. 62 frá 31. mai 2010 um Húsalánsgrunn avmarkar í § 8 b, stk. 1, Bústaðir til at útvega sær fígging frá lánveitarum/íleggjarum í Føroyum. Henda markaforðingin verður ikki broytt við hesum uppskotinum. Lániheimildin hjá Bústøðum verður tí framvegis avmarkað til, at Bústaðir bara kunnu útvega sær fígging frá lánveitarum/íleggjarum í Føroyum.

2.10. Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv

Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

2.11. Skattir og avgjøld

Ongar ásetingar eru í lógaruppskotinum um skattir ella avgjøld.

2.12. Gjøld

Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið fólki skyldur?

Lógaruppskotið leggur ikki skyldur á fólk.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur?

Við lógaruppskotinum fáa Bústaðir heimild til at útskriva lánsbrøv fyri 500 mió. kr., men lántøkan skal í hvørjum einstøkum føri góðkennast av landsstýrismanninum í fíggjarmálum. Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til annan landsstýrismann ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?

Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?

Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar við sær enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum

	Fyri landið ella lands-myndugleikar	Fyri kommununalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Ja	Ja	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Ja	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar	[redacted]	[redacted]	Ja	Ja	[redacted]

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina.

Til § 1

Til nr. 1:
Ásetingin broytir orðið "lutafeløg" til "lutaíbúðafeløg". Mett verður, at heitið "lutaíbúðafeløg" er greiðari og í størri mun fevnir um tað, sum var ætlanin við § 5 a í løgtingslógini um Húsalánsgrunn. Í løgtingslóg nr. 138 frá 6. oktober 2011 um lutaíbúðafeløg verður heitið "lutaíbúðafeløg" brúkt. Tí verður eisini mett, at sama heitið eigur at verða brúkt í løgtingslóg nr. 62 frá 31. mai 2010 um Húsalánsgrunn.

Til nr. 2:
Ásetingin setir inn nýtt punktum, sum ger greitt, at Húsalánsgrunnurin/Bústaðir kunnu útvega lutaíbúðir til lutaíbúðafeløg. Í galdandi lóg um Húsalánsgrunn er ikki greitt, at Húsalánsgrunnurin/Bústaðir kunnu byggja og útvega lutaíbúðir til lutaíbúðafeløg. Í hesum føri merkir "útvega lutaíbúðir til lutaíbúðafeløg", at "byggja og síðani selja lutaíbúðir til lutaíbúðafeløg."

Lutaíbúðir og lutaíbúðafeløg eru nýggj fyribrigdi í Føroyum. Síðan lutaíbúðalógin kom í gildi á heysti 2011, er kortini einki lutaíbúðafelag stovnað. Bústaðir hava ætlanir um at útvega og selja lutaíbúðir til lutaíbúðafeløg næstu árini.

Hetta er liður í at tryggja fjølbroytni á bústaðamarknaðinum, sum er eitt av endamálunum hjá Húsalánsgrunninum/Bústøðum sambært endamálsorðingini í løgtingslóg nr. 62 frá 31. mai 2010 um Húsalánsgrunn og samsvarar eisini við bústaðapolitikk landsins frá 2012.

Til nr. 3:
Við hesi áseting gevur Løgtingið Bústøðum (Húsalánsgrunninum) heimild til at útskriva lánsbrøv fyri upp til 500 mió. kr. afturat verandi lániheimild til føroyskar íleggjarar og stovnsligar føroyskar lánveitarar til at fíggja byggiverkætlanir fyri. Verandi lániheimild er upp til tilsamans 250 mió. kr.

Víðkaða lániheimildin verður brúkt til at fara undir eina verkætlan at byggja um 400 leigu-, luta-, lestrar- og vardar íbúðir afturat verandi ætlanum.

Partur av hesum nýggju íbúðunum verða tøkar hjá Almannaverkinum at lata fólki við serligum avbjóðingum. Eisini verða nakrar av hesum tøkar á bráðtørvslistanum.

Til nr. 4-7:
Talan er um fylgibroytingar, av tí at eitt nýtt stk. 2 verður sett inn í lógina.

Til § 2

Áseting um gildiskomu.

Á Løgtingi, 9. september 2020

Kristina Háfoss Sirið Stenberg Høgni Hoydal

Beinta Løwe Jacobsen Hervør Pálsdóttir